| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**28. januar 2005** | Blað nr.:<br>**6092**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **28. januar 2005 kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **29/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Katrin Dahl Jakobsen
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Marin Katrina Frýdal
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Heri Olsen

**FUNDUR LOKIN KL. 17.55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM:

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**29/05** **200500067**

**Uppskot til val av stýrislimi og varalimi í SEV-stýrið fyri 4 ár.**

Sbrt. § 4 í viðtøkum fyri elfelagið SEV velur umboðsnevndin fyri SEV 7-manna stýri at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum.

Tórshavn kommuna fær ein stýrislim.

Býráðið setur vanliga uppskot fram um, hvønn býráðið skjýtur upp sum stýrislim og varalim í stýrið hjá SEV.

**Býráðið 28. januar 2005:** Jan Christiansen mótmælti vegna minnilutan dagsskránni, tí hon er mangulfull, og boðaði frá, at minnilutin ikki góðtekur hana.

Fyrst var atkvøtt um at góðkenna dagsskránna.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Dagsskráin var sostatt góðkend við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Borgarstjórin bað um uppskot til valevni, og skeyt Jógvan Arge vegna meirilutan upp at velja Leiv Hansen til stýrislim og Katrin Dahl Jakobsen til varastýrislim.

Áðrenn atkvøtt var í málinum mótmælti Jan Christiansen fundinum vegna minnilutan og boðaði frá, at tey fóru av fundi.

Síðani fóru Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen av fundi.

Einmælt samtykt at mæla umboðsráðnum til at velja Leiv Hansen sum stýrislim og Katrin Dahl Jakobsen sum varastýrislim.